**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 30/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi** (Strika uppboðssølu av rættindum á Flemish Cap)

Jørgen Niclasen, tingmaður, hevur vegna Fólkaflokkin lagt málið fram tann 19. september 2018, og eftir 1. viðgerð tann 25. oktober 2018 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 20., 26. og 27. november og 3. desember 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Felagið Línuskip, Føroya Reiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag, Thor og Høgna Hoydal, landsstýrismann í fiskivinnumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Jákup Mikkelsen, Janus Rein, Helgi Abrahamsen og Bárður Kass Nielsen) vísir á, at seinastu árini hava verið sera tung hjá heimaflotanum, men at hækkaðu kvoturnar á Flemish Cap eru kærkomin møguleiki.

Sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi skal øll henda hækking seljast á uppboðssølu. Heimaflotin, sum hevur strítt seg ígjøgnum ta longu tíðina við lakum fiskiskapi, hevur tí onga trygd fyri at fáa lut í hækkaðu kvotunum

Endamálið við hesum uppskotinum er, at heimildin hjá landsstýrismanninum við fiskivinnumálum at selja part av kvotunum á Flemish Cap verður tikin burtur.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer og Ingolf S. Olsen) tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 5. desember 2018**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Janus Rein | Bjarni Hammer |
| Ingolf S. Olsen | Helgi Abrahamsen | Jákup Mikkelsen |
| | Bárður Kass Nielsen | |